# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýtt portur inn í føroyskt

Orðabókin er eitt hitt hentasta amboð í gerandisdegnum. Skúlar, vinnulív, bókliga áhugaðir einstaklingar, ferðandi og mong onnur hava dag og dagliga brúk fyri orðabókum. Í Føroyum hevur tørvurin verið sera stórur í mong ár á so at siga øllum økjum. Samstundis, sum vit ásanna hendan stóra tørvin, kunnu vit staðfesta, at støðan er heilt nógv batnað seinastu árini. Vit hava fingið stóru móðurmálsorðabókina, vit hava fingid danskt-føroyskar orðabøkur, enskt-føroyskar eins væl og føroyskt enskar orðabøkur, samheitaorðabók og aðrar orðabøkur.

Hetta er alt samalt sera gott og gagnligt, serstakliga fyri skúlarnar og vit hava einstøkum eldsálum so væl sum almennum stovnum nógv fyri at takka í hesum sambandi. Nú er so komin enn ein nýggj orðabók nevniliga ein sponsk-føroysk og nú ber til at leita fram føroysk orð beinleiðis úr sponskum. Talan er um nýggja skúlaorðabók og øll fegnast sjálvsagt um hetta góða tiltak. Jógvan í Lon, kendur málfrøðingur, nevnir nýggju orðabókina fyri at vera eitt nýbrot í føroyskum orðabókaarbeiði.
Tað eru tær báðar Randi Meitil og Birgit Remmel, málfrøðingar og lærarar í sponskum og føroyskum, ið hava gjørt nýggju orðabókina. Bókin er serliga ætlað miðnámsskúlunum. Í bókini eru útvald leitiorð, ið eru mest viðkomandi hjá miðnámsskúlanæmingum og øðrum, ið vilja læra spanskt.

Í sambandi við framløguna varð upplýst, at á hvørjum ári læra á leið 200 føroyingar seg spanskt á miðnámsstøði. Við nýggju orðabókini hava føroyingar, sum læra seg spanskt sostatt fyri fyrstu ferð møguleika at leita upp føroyskar týðingar beinleiðis úr sponskum uttan at noyðast umvegis danskt fyrst.
Talan er sostatt sum Jógvan í Lon, málbar seg við framløguna av bókini um eitt beinleiðis portur, ið nú er latið upp úr sponskum inn í føroyskt. Hetta er ein stór hending, tá hugsað verður um, at spanskt telist millum heimsins størstu mál, sum Jógvan í Lon í sama viðfeingi vísti á. Vit kunnu bert vera samd við honum í hesum.

Sama dag, sum nýggja orðabókin kom út, gjørdist orðabókaportalurin hjá Orðabókagrunninum tøkur í nýggjum í sniði. Sum fyrsta skúlaorðabókin hjá Orðabókagrunninum hevur spanska orðabókin sítt serliga pláss á nýggja portalinum. Hesin portalur skal geva telduatgongd til allar tær orðabøkur, ið Orðabókagrunnurin gevur út – teirra millum móðurmálsorðabókina. Samantikið ein stór og gleðilig hending, men sum alt ið hevur við føroyskt mál at gera er ymist í tekstinum, sum undrar, eitt nú at kann ein sakna konsekvens í landafrøðiligum o.ø. heitum. Hetta kann ørkymla brúkaran av hesi annars frálíku bók. Hinvegin er hetta jú ein vanligur trupulleiki hjá okkum og lýsir hetta bert tørvin á einum skipaðum málpolitikki. Ein slíkan málpolitikk fáa vit vónandi, eftir at Løgtingið í heyst hevur havt aðalorðaskifti um málpolitikkin í framtíðini. Tá hetta er sagt, so skulu vit samstundis takka Randi Meitil og Birgit Remmel fyri avrikið – bókin fer ivalleyst at verða næmingum og lærarum til gagns.

**Sosialurin**

## Nyggjan flogvøll og hvat so?



**FRANK DAVIDSEN**
Sørvágur

Jú fyri tað fyrsta, so fer ferðavinnan sambært Sjúrði Skaale at blóma sum ongantíð fyrr, samstundis sum heilt aðrir møguleikar verða at útflutta feskan fisk.
Til tað er at siga, at við teimum minimalu nøgdunum og hartil óstabilu viðurskiftunum vegna veður o. a., so kemur tað ongantíð upp á tal, at sáttmálar kunna gerast í samband við útflutning av ferskun fiski. Tí er tað ein beinleiðis reingjan av veruleikanum, tá hetta verður brúkt sum argument fyri nýggjun flogvølli.
Hví ikki síggja veruleikan og leggja tøl á borðið, sum vísa hvussu nógv er útflutt av fiski loftvegis higartil? Eingin sum helst ivi er um, at var tað nakar sum helst áhugi, so hava góðir møguleikar verið fyri at gjørt hesa sápubløðru til veruleika. Til dømis tá tvey feløg kappaðust á Føroyarutuni, og tað var so stórur avlopskapasitetur, at pláss var fyri fleiri tonsum dagliga. Og ikki at tala um, tá Maersk í longri tíð hevði ein avlopskapasitet uppá eini 60-70%. Og hvørja viðmerking hevur okkara flakavinna til, at politikarar argumentera fyri at gera milliarda íløgur í nýggjan flogvøll fyri at flyta feskan, óviðgjørdan fisk av landinum, so at arbeiðspláss í hópatali í okkara fiskivinnu koma í vanda fyri at hvørva sum døgg fyri sól.
Og so kemur Bjarni Djuurholm við tí eftihondini kenda gullegginum, at fáa vit ein altjóða flogvøll, so fáa vit ein regularitet, sum bæði Heathrow og Frankfurt fara at misunna okkum. Álvaratos, sjálvur meti eg mannin verða sera skilagóðan, eisini sum politikara, men at billa fólki inn, at tá hvørki dómari, spælarar ella ákoðarar kunna síggja, hvar bólturin er á fótbóltsvøllinum á Argjun á einum øki, sum er á leið á stødd við nakrar húsagrundir, so kunnu flogfør uttan trupulleikar lenda á Glyvursnesi í somu líkindum, tað er langt úti.
Havi verið eitt summar í Tórshavn, har tú illa sást húsana millum, og lúðurin á Molanum ýldi í samfullar tríggjar vikur uttan íhald, tí hann lá av eystri og landsynnigi. Samstundis var sól og hoyterri í Vágum hvønn dag. Tað skal samstundis viðurkennast, at sunnan og útsyningur er ringasta ætt í Mykinesfirði. Hesir veruleikar eru bert ein áminning um, at vit eru eitt oyggjaland við serligum vind og veðurviðurskiftum, sama um fleiri flogvallir verða bygdir.
Tá Glyvursnes-ætlanin var í hæddini síðst í fýrsunum, var høvuðsgrundgevingin eitt lítið suð av einum motori, sum skuldi prógva, hvussu lítlan larm flogfarið gjørdi, tá tað fleyg yvur Havnini. Hinvegin var einki nevnt um turbulens, og mjørki á Glyvursnesi var ein býur í Kina.
Taka vit til dømis í ár, so høvdu vit eitt summar við eysturætt meginpartin av sumrinum, soleiðis at bláur himmal og sól var í vikuvís yvir Vága floghavn, burtursæð frá einstøkum døgum. Av tí sama var regularitetur in góður.
At billa sær inn, at ongin turbulensur, mjørki ella aðrir trupulleikar kunna gera seg galdandi á einum møguligum flogvølli á Glyvursnesi í stormi av útsynningi, tá innflúgvingin skal gerast inn yvir fjøllini í Norðoyggjun og Eysturoynni, og harafturat í mjørkaveðrið, tá skal ein verða óluksáliga lokalur.
Tað er vist, at tað kann gerast ógvuliga turbulent, bæði so og so. At gera eina milliarda íløgu í nýggjan flogvøll í samband við ferðavinnuna bara fyri at sleppa at flúgva kanska 5 minuttir styttri, og at vit harafturat biðja arbeiðskvinnuna á Vesturbrúgv gjalda hesa íløgu er so langt úti, at bæði løgmaður og Poul Michelsen skuldu skammast.

## Er politiska systemið farið í koma?

**EGIN MARKNÁ**

Hoyrdi beint nú úr løgtinginum, at Hans Pauli Strøm, uttan mótmæli, varð valdur til løgtingsgrannskoðara. Hetta tykir mær sera løgið og konsekvensleyst, tí tað er ikki meira enn ein lítil mánaði síðan, at Hans Pauli varð kroystur úr starvi, sum landstýrismaður, vegna óskil í peningamálum.
Er tað veruliga so lítil álvari og stirðil í Løgtinginum?
Gamalt var, - at man setti ikki revin at ansa gæsnum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.